Vit hava arbeiðsgevararnar, semingsstovnin og politikararnar ímóti okkum

- Uratkvøða er ongantið brúkt í mínari tíð sum forkvinna, og eg haldi avgjørt ikki, at henda skipan kann brúkast. Øll, sum ikki hava høvi ella nýta høvi at atkvøða við eina slíka atkvøðugreiðslu, verða tald við sum ja-sigarar, og tað haldi eg vera burtur við. Tað eru ikki øll, sum fara á val, og tað eru heldur ikki øll, sum eru heima og hava høvi at atkvøða, sigur Karla Einarsson, forkvinna í arbeiðarafelagnum Hæddini

- Vit halda, at semingsstovurin hevur roynst ógvuliga illa, og vit halda eisini, at Karsten Hansen skuldi latið vera við at blanda seg upp í samráðingarnar, sum hann hevur gjørt alla tíðina, sigur Karla Einarsson, forkvinna í arbeiðarafelagnum Hæddini

VERKFALL
Vilmund Jacobsen

Tað er einki, sum bendir á, at arbeiðarafeløgini í verkfalli ikki standa saman um síni lønarkrøv, nú verkfallið skjótt hevur vart í tríggjar vikur.

Hetta vísti fjølmenti fundurin, sum var í ítróttarhøllini á Hálsi leygardagin, har eini 700-800 arbeiðarar, sum eru í verkfalli, møttu til fundar at umræða støðuna.

- Fundurin vísti greitt, at fólk taka ikki undir við tí, sum okkum higartil hevur staðið í boði, tí tey halda hetta vera ov lítið í mun til teir lønarbatar, sum onnur hava fingið.

Karla Einarsson, forkvinna í arbeiðarafelagnum Hæddini, sigur, at eingin "slingur er í valsinum" millum limirnar, og tí heldur verkfallið fram, til ein veruligur lønarbati er á borðinum.

Eingin uratkvøða

Hon sigur, at fundurin leygardagin vísti greitt, at limirnir í arbeiðarafeløgunum als ikki taka undir við teirri uratkvøðu, sum semingsmenninir hava borið uppá mál, tí henda skipan er gomul og órættvís.

- Øll, sum vóru á fundinum, vóru ímóti, at semingsuppskotið verður sent út til uratkvøðu.

Karla sigur, at uratkvøða er ongantið brúkt í hennara tíð sum forkvinna, og hon heldur ikki, at henda skipan kann brúkast.

- Øll, sum ikki hava høvi ella nýta høvi at atkvøða við eina slíka atkvøðugreiðslu, verða tald við sum ja-sigarar, og tað haldi eg vera burtur við. Tað eru ikki øll, sum fara á val, og tað eru heldur ikki øll, sum eru heima og hava høvi at atkvøða.

Hon heldur tí, at ein slík skipan als ikki kann brúkast, tí hon gevur ikki røttu myndina.

- Haraftrat kemur, at landið fer at liggja nógv longri í sáttmálaloysi, um málið fer út til uratkvøðu. Brævposturin er ikki beinleiðis raktur av verkfallinum, men har brøv og frakt verða send saman, er skjótt, at posturin verður tarnaður. Útberingin av posti gongur heldur ikki sína vanligu gongd sum er, tí allir bilarnir hjá Postverkinum hava ikki olju.

Tað eru semingsmenninir, ið hava tosað um uratkvøðu, men sambært Karlu, skal ein slík atkvøðugreiðsla fara fram í semju við arbeiðarafeløgini.

- Og vit taka als ikki undir við at koyra semingsuppskotið út til uratkvøðu, leggur hon dent á.

Forkvinnan í Hæddini undrast eisini yvir, at semingsmenninir yvirhøvur tosa um uratkvøðu, tí eitt slíkt stig hevði lagt landið lamið í langar tíðir, og hesum hava arbeiðarafeløgini ongan áhuga í.

- Vit vilja hava ein líkinda sáttmála undir land, sum vit kunnu vera nøgd við. Tá ið hesin er komin uppá pláss, fara vit aftur til arbeiðis.

Alivinnan bløðir

Karla Einarsson harmast um, at verkfallið skuldi gerast so drúgt, men hon dugir ikki at síggja, at tað kann vera øðrvísi, tá ið arbeiðarafeløgini, sum hon tekur til, bæði hava arbeiðsgevararnar, semingsstovnin og politikararnar ímóti sær.

- Vit halda, at semingsstovurin hevur roynst ógvuliga illa, og vit halda eisini, at Karsten Hansen, landsstýrismaður í figgjarmálum, skuldi latið vera við at blandað seg upp í samráðingarnar, sum hann hevur gjørt alla tíðina, sigur hon.

Forkvinnan í Hæddini harmast serliga um støðuna í alivinnuni, sum er rakt av ILA, og her hugsar hon ikki minst um alingina á Skálafjørðinum og á Gøtuvík.

- Tað hevur verið eitt ógvuliga stórt trýst frá alivinnuni, nú støðan er, sum hon er, men vit hava givið nøkur undantaksloyvir, sum kunnu byrgja uppfyri tí ringasta, sigur Karla Einarsson at enda.

UTTAN ÚR HEIMI

Søgulig avgerð í Ísrael

Fyri fyrstu ferð hevur Ísrael viðurkent, at palestinar hava rætt til at fáa sítt egna ríki

ÍSRAEL
Árni Joensen

Ariel Sharon, forsætisráðharri og stjórn hansara hava nú viðurkent, at palestinska fólkið hevur rætt til sítt egna ríki

Tað stóð nógv á fleiri av teimum ísraelsku ráðharrunum, tá teir sunnudagin góðkendu tað seinasta friðaruppskotið, sum ST, ES, USA og Russland hava gjørt.

Ein liður í uppskotinum sigur, at palestinar skulu fáa sítt egna ríki í 2005. Fleiri ísraelskir ráðharrar hava í seinastuni sagt, at teir kundu ikki taka undir við uppskotinum, og so seint sum seinasta fríggjadag segði ein av teimum týdningarmestu ráðharrunum, Shaul Mofaz, verjumálaráðharri, at friðaruppskotið er beinleiðis vandamikið fyri Ísrael.

Men sunnudagin atkvøddi hann fyri uppskotinum. Tað hendi, eftir at Ariel Sharon, forsætisráðharri, hevði boðsent øllum ráðharrunum hjá Likudflokkinum á ein serligan fund, har hann gjørdi greitt, at stjórnin hevði einki í at velja enn at góðtaka uppskotið. Tað hevði Sharon fingið at vita úr Washington.

Tá atkvøtt varð, tóku tólv ráðharrar undir við friðaruppskotinum, meðan sjey atkvøddu ímóti, teirra millum tríggir úr Likudflokkinum hjá Sharon. Fýra ráðharrar atkvøddu blankt, teirra millum Benjamin Netanyahu, figgjarmálaráðharri.

Kortini er tað greitt, at hvørki Sharon ella hinir ráðharrarnir góðtaka friðaruppskotið, soleiðis sum tað er orðað í løtuni. Samtyktin í stjórnini merkir í veruleikanum bert, at Ísrael góðtekur uppskotið sum grundarlag fyri komandi samráðingum. Men eftir stendur tann søguliga samtyktin, har Ísrael fyri fyrstu ferð formliga viðurkennir, at palestinararnir hava rætt til sítt egna ríki.

Nú peikar Bush á Iran

Kríggið í Irak er liðugt, men nú vendir amerikanski forsetin sær ímóti Iran

YVIRGANGUR
Árni Joensen

Amerikanarar vilja vera við, at limir í yvirgangsfelagsskapinum al-Qaeda, sum halda til í Iran, høvdu samband við bumbuatsóknina í Riyadh tann 12. mai, tá 34 fólk, teirra millum átta amerikanarar, doyðu.

Tað hevur gjørt, at amerikanska stjórnin hevur kvett alt samband við Iran, men prestastýrið í Teheran avsannar, at tað stuðlar al-Qaeda. Hetta rínir ikki við stjórnina hjá George W. Bush, forseta, sum sambært blaðnum Washington Post tykist vera farin undir ein politikk, sum skal fáa iranska stýrið at rilla.

Bush hevur kravt, at iransku myndugleikarnir fara í hernað ímóti al-Qaeda, og iranski uttanríkisráðharrin, Kamal Kharazi, segði sunnudagin, at al-Qaeda er ein vandamikil felagsskapur, og at Iran er til reiðar at stríðast ímóti honum. Men hetta er ikki nóg mikið hjá amerikansku stjórnini, og í gjár høvdu ráðgevararnir hjá forsetanum fund um, hvat gerast skal við Iran.

Amerikansku hernaðarátøkini í Afghanistan og Irak verða stogd at hava skelkað iranska prestastýrið, sum neyvan er serliga hugað at fáa somu viðferð sum Taliban og Saddam Hussein. Amerikanararnir tosa ikki um nakað tílikt átak ímóti Iran, men Washington Post skrivar, at einum nýtist ikki at hava tað stóra hugflogið fyri at ímynda sær, hvat kann henda einaferð seinni.

Seinastu tíðina hava amerikanskir embætismenn næstan dagliga verið í fjølmiðlunum við atfinningum at Iran, sum verður lagt undir at taka undir við yvirgangi og at fjala limir í al-Qaeda.